LØGTINGSINS
UMBOÐSMAÐUR

Tórshavn, tann 15. juli 2013
J.Nr.:11/ 201300006/18
(at tilskila í svari)
Tykkara J.nr.

**Álit**
viðvíkjandi noktandi svari upp á meirinnlit í frágreiðing frá fundi millum løgmann og danska forsætismálaráðharran

Við teldubrævi 15. januar 2013 hevur A, blaðstjóri á Dimmalætting, sent umboðsmanninum soljóðandi klagu:

> ”Eg fari at kæra um avgerð og viðgerð í einum máli um meirinnlit.
>
> Eg kæri um, at eg ikki meti, at mín umsókn um meirinnlit (sum eg sendi, tá eg ikki fái fundarfrásøgnina frá fundinum millum Thorning-Schmidt og Holm Johannesen) hevur fingið sakliga og neyva viðgerð. Eg haldi heldur ikki, at noktandi svarið er grundað. Og eg kæri eisini um, at eg ikki enn havi fingið nakað sum helst svar uppá mítt tilmæli um at viðgera umsóknina um meirinnlit av nýggjum. Hetta seinasta sendi eg Løgmansskrivstovuni 20. desember, og har er ikki so frægt sum komin fráboðan um, at brævið er móttikið.”

**Málsgongd**
Við teldubrævi 13. desember 2012 sendi A, blaðstjóri, Løgmansskrivstovuni soljóðandi áheitan um innlit:

> ”Í Løgtinginum í gjár undir viðgerðini av uppskotinum um avtøku av Landsbanka Føroya kom fram, at samskifti hevur verið millum Statsministeriet í Danmark og Løgmansskrivstovuna um hetta málið. Hervið verður biðið um alment innlit í hetta samskiftið.
> Havandi í huga, at 3. og endaliga løgtingsviðgerð verður av málinum í nærmastu framtíð, verður biðið um skjóta viðgerð og avgerð.”

Løgmanskrivstovan svaraði innlitsáheitanini við soljóðandi teldubrævi 14. desember 2012:

> ”Í málinum fyriliggur hetta skrivliga samskiftið millum Løgmansskrivstovuna og Statsministeriet:
>
> a. Einsíðug fundarfrásøgn sendiharra Føroya í Danmark frá óformligum fundi millum Statsministaran og Løgmann 16. november 2012, har m.a. Landsbankin var nevndur.
> b. Talupunkt løgmans til fundin við Statsministaran 16. november 2012.
>
> Innlit verður ikki veitt í fundarfrásøgnina vísandi til, at skjalið er internt sbr. innlitslógini § 7, nr. 1.

undir Bryggjubakka 11 • Postrúm 2008 • FO-110 Tórshavn • Tlf. 358500 • Faks 358501 • lum@lum.fo • www.lum.fo

Talupunktini vóru handaði statsministaranum eftir fundin, og eru tí vorðin ekstern, og innlit verður tí hjálagt."

Við teldubrævi 17. desember 2012 sendir Dimmalætting Løgmansskrivstovuni soljóðandi áheitan:

"Eg fari at biðja teg umhugsa at geva meirinnlit í fundarfrásøgnina, eftirsum talan er um mál av serliga stórum almennum áhuga og samfelagsligum týdningi."

Løgmansskrivstovan svaraði áheitanini við soljóðandi teldubrævi 19. desember 2012:

"Avgjørt er ikki at veita meirinnlit.

Skjalið er eitt innanhýsis skjal til arbeiðsnýtslu. Tað er ikki avstemmað við danir, at tað, sum niðurskrivað er, er samsvarandi teirra uppfatan av tí, sum fór fram á fundinum, eins og dentur allatíðina hevur verið lagdur á, at fundurin var óformligur."

Tann 20. desember 2012 sendi Dimmalætting Løgmansskrivstovuni soljóðandi teldubræv:

"Takk fyri svar, tó eg meti, at avgerðin um noktan av meirinnliti ikki er grundað.

Eg meti, at hetta seinna svarið hjá tær neyvan lýkur krøvini til ta avviging, sum tit hava skyldu at gera í málum um meirinnlit. Mann skal síggja, hvussu tey ymsu fyrilitini eru vigað upp móti hvør øðrum – og eg síggi ikki, at opinleiki yvirhøvur – er tikin við á vektina her.
…
Eg haldi, at tað er farið at líkjast eini praksis, at tit nokta meirinnlit, og eg vil hervið vísa á, at tað er í stríð við lógina. ...

Við vón um enn eina viðgerð og aðra niðurstøðu."

22. januar 2013, t.v.s. eina viku eftir, at Dimmalætting hevði klagað til umboðsmannin, sendi Løgmansskrivstovan Dimmalætting soljóðandi teldubræv:

"Vit hava nú mett av nýggjum, og sum tú sjálv sigur, so er byrjunarstøðið, eisini fyri meirinnliti, at innlit skal gevast. Skal noktast, skulu sakligar grundir verða, sum viga tyngri, enn atlitið til at almenningurin fær innlit.

Og tað er júst tann avvigingin, sum er farin fram í hesum førinum. Hægsti leiðari í Danmark og hægsti leiðari í Føroyum mugu hava møguleika óformelt og frítt at tosa saman og avgera, at tað, sum tosað verður um, er sínámillum.

Avtala er gjørd um ein óformellan fund, har tað frá okkara síðu eru sett nøkur stikkorð á blað til interna nýtslu. Lata vit hesi stikkorð út, uttan at talan er um formliga góðkenda frásøgn frá hini síðuni, kann tað skaða okkara møguleika framyvir yvirhøvur at fáa í lag óformellar fundir við danska statsministaran landinum at gagni.

Her halda vit, at innlitsáhugamálini mugu víkja fyri atlitinum at hava møguleika fyri óformligar fundir á hægsta stigi."

**Partshoyring**

Fyri at umboðsmaðurin kundi taka støðu til, um hann átti at taka hetta mál til viðgerðar, varð klagan við skrivi, dagfest 16. januar 2013, send Løgmansskrivstovuni til ummælis, samstundis sum Løgmansskrivstovan varð biðin um at lata umboðsmanninum umrøddu fundarfrásøgnina til láns.

Tann 18. januar 2013 sendi Løgmansskrivstovan umboðsmanninum soljóðandi viðmerkingar:

> ”Vísandi til kæru til løgtingsumboðsmannin frá A á Dimmalætting 16. januar 2013 um meirinnlit í fundarfrásøgn frá fundi Løgmans við Statsministaran 16. november 2012 sendi eg hjáløgd skjølini í málinum.
>
> Vit hava ikki so nógvar viðmerkingar aðrar enn, at svar uppá uppafturtøkuumsóknina av meirinnlitsumbøn 20. desember 2012 ikki fekk so høga raðfesting fyri jól, av tí at svarað var ikki minni enn tvær ferðir í málinum. Fyrst svar uppá innlitsumbøn og síðan svar uppá meirinnlitisumbøn.
>
> Nógv hevur ligið á láni eftir jól og arbeiðsorkan verður sjálvsagt raðfest altíð eftir karakterinum á málunum. Men vit vænta at senda svar uppá uppafturtøkuáheitanina í næstum.”

Umboðsmaðurin gjørdi av at kanna hetta málið nærri, og við skrivi, dagfest 23. januar 2013, vórðu viðmerkingarnar hjá Løgmansskrivstovuni sendar klagaranum til ummælis við einari freist áljóðandi 14 dagar.

Við teldubrævi 5. februar 2013 hevur Dimmalætting sent umboðsmanninum soljóðandi viðmerkingar:

> Løgmansskrivstovan hevur sent Løgtingsins Umboðskvinnu viðmerkingar í kærumálinum, og vit hava í tí sambandi hesar:
>
> Í fyrsta lagi er at siga, at arbeiðsorka og raðfestingar av “karakterinum á málinum” ikki er ein grundgeving fyri at fara út um freist, ásetta í lóg.
>
> Í noktandi svarinum frá Løgmansskrivstovuni 22. januar 2013 kann lesast, at Løgmansskrivstovan í roynd og veru hevur ta generellu støðu, at meirinnlit ongantíð skal latast í slíkar “óformellar fundir”, tí Løgmansskrivstovan annars óttast at missa møguleikan fyri at fáa “óformellar fundir á hægsta stigi”. Hetta góðtaka vit ikki og halda ikki, at hetta samsvarar við lógina, sum krevur, at myndugleikin altíð vigar atlitið til, at almenningurin fær alment innlit – og annars vigar hvørt mál sær og gevur tí individuella viðgerð.
>
> Harafturat kundi eg hugsað mær at vita, hvar í lógini um alment innlit stendur, at “óformellir fundir” hava serliga verju. …
>
> Sokallað "diskretiónshensyn" - tað vildi verið, at landsstýrið hevur lovað stjórnini trúnað - kundi kanska verið grundgeving, men tey siga jú ikki, at talan er um trúnaðarupplýsingar - men eitt § 7-skjal, og tað framgongur heldur ikki, at tey hava gjørt nakra avtalu við stjórnina um at tiga. Løgmansskrivstovan hevur eisini notatskyldu, sjálvt um talan er um óformellan fund, og mong eru dømi um, at innlit eru latin í einsíðug fundarreferat, har tað so er áteknað, at talan júst er um eitt slíkt: nevniliga einsíðugt fundarreferat.
>
> Fólkatingsins Umboðsmaður hevur fleiri ferðir lagt dent á, at meirinnlit skal metast í ljósinum av mannarættindasáttmálanum art. 10 um talufrælsi, og at tað skulu "tungvejende samfundsmæssige hensyn" fyri at mótviga meirinnliti, sí t.d. FOB2005.485. Er tað tað?
>
> Okkara áheitan er tí, at Løgmansskrivstovan útflýggjar fundarfrágreiðingina við tí fyrivarni, at hetta er eitt einsíðugt referat, sum ikki avspeglar nakra felags støðu – hetta eigur vera nóg mikið til, at Løgmansskrivstovan hevur síni viðurskifti í lagi. Her er eisini talan um presedens, tí landsstýrið hevur gjørt júst hetta - útflýggjað løgfrøðiligt upprit um havnagjøld við slíkum fyrivarni, hóast talan var um innanhýsis skjal.

> …
>
> Dimmalætting metir tí, at tað hevði verið í rættari meirinnlitsanda, at Løgmansskrivstovan útflýggjar sítt skjal, sum vit biðja um, við einum líknandi fyrivarni um, at skjalið t.d. ikki endurgevur nakra felags støðu ella endaliga støðu hjá landsstýrinum.”

Við skrivi, dagfest 8. februar 2013, vórðu viðmerkingarnar hjá Dimmalætting sendar Løgmansskrivstovuni til ummælis við eini freist áljóðandi 14 dagar.

Av tí at umboðsmaðurin einki hevði frætt aftur frá Løgmansskrivstovuni, boðaði hann pørtunum frá við skrivi, dagfest 18. mars 2013, at umboðsmaðurin fór undir endaligu viðgerðina av málinum.

**Niðurstøða**

Viðgerð mín av hesum máli snýr seg um, at Løgmansskrivstovan hevur sýtt fyri at veita Dimmalætting *meirinnlit* í frásøgn frá einum fundi millum løgmann og danska forsætismálaráðharran í november 2012, har m.a. ætlanin at niðurleggja Landsbankan varð umrødd.

Sambært skjølunum hevur Dimmalætting fingið innlit í talupunkt løgmans til nevnda fund.

Løgmansskrivstovan sýtti í fyrsta umfari fyri at geva innlit í fundarfrágreiðingina við teirri grundgeving, at talan var um eitt innanhýsis arbeiðsskjal, jbr. § 7 í innlitslógini (løgtingslóg nr. 133 frá 10. juni 1993 um innlit í fyrisitingina). Eg havi havt høvi at lesa fundarfrásøgnina ígjøgnum. Talan er um eina einsíðuga fundarfrásøgn, sum má metast at vera gjørd til egna nýtslu hjá Løgmansskrivstovuni. Tað er tí eingin ivi um, at fundarfrásøgnin er at meta sum eitt innanhýsis skjal, sum er fevnt av § 7, stk. 1, og sum í útgangsstøðinum ikki er fevnt av rættinum til alment innlit.

Eitt innanhýsis skjal ella partar av tí kunnu tó sambært § 11, stk. 1 í lógini vera fevnd av rættinum til alment innlit, um skjalið inniheldur upplýsingar um veruligar umstøður, sum eru av stórum týdningi fyri málið. Framganga slíkar upplýsingar av øðrum tilfari í málinum, hevur myndugleikin tó ikki skyldu at ekstrahera upplýsingarnar. Tað framgongur ikki av skjølunum, at Løgmansskrivstovan hevur mett um hendan spurningin, men eftir at hava lisið skjølini í málinum, dugi eg ikki at síggja, at fundarfrásøgnin inniheldur slíkar upplýsingar, sum ikki eisini framganga av m.a. talupunktunum, sum Dimmalætting fekk innlit í.

Sambært § 4, stk. 1, 2. pkt í innlitslógini kann ein myndugleiki loyva skjalainnliti í størri mun, enn lógin ásetir, um ikki annað fylgir av reglunum um tagnarskyldu v.m. Hetta merkir, at hóast skjøl og upplýsingar sambært innlitslógini eru undantikin frá rættinum til innlit, so kann myndugleikin gera av at veita innlit í hesi.

Eftir at hava viðgjørt spurningin um meirinnlit tvær ferðir, noktaði Løgmansskrivstovan 22. januar 2013 at geva Dimmalætting meirinnlit í umrøddu fundarfrásøgnina. Víst varð til atlitið til ikki at skaða møguleikarnar framyvir at fáa í lag óformellar fundir við danska forsætismálaráðharran.

Sum umboðsmaður kann eg kanna, um ein myndugleiki eftir áheitan hevur umhugsað at veita meirinnlit, og um myndugleikin í hesum sambandi hevur tikið viðkomandi og saklig atlit. Løgmansskrivstovan hevur eftir áheitan viðgjørt umbønina um meirinnlit, og eftir míni fatan er atlitið til møguleikan at hava fundir millum løgmann og danska forsætismálaráðharran eitt lógligt atlit at taka.

Vísandi til at avgerðin hjá Løgmansskrivstovuni byggir á eina meting, sum er grundað á lóglig atlit, haldi eg meg ikki kunna finnast at avgerðini hjá Løgmansskrivstovuni um ikki at veita Dimmalætting meirinnlit í umrøddu fundarfrásøgnina.

Klagað er eisini um, at tað tók Løgmansskrivstovuni ein mánað at viðgera og svara seinnu áheitanini um at taka málið uppaftur. Vísandi til, at hetta var onnur umbønin um meirinnlit í sama mál í einum tíðarbili uppá eina viku, havi eg ikki grundarlag fyri at finnast at málsviðgerðartíðini hjá Løgmansskrivstovuni.

Sólja í Ólavsstovu
umboðsmaður